Limir hjá Skipara-og Navigatørfelagnum:

# Taka upp verkfalsrakt arbeiði

**Mikudagin var lýst í útvarpinum, at Skipara- og Navigatørfelagið noktar limum felagsins at taka upp verkfalsrakt arbeiði. Hetta kann tykjast eitt sindur løgið, og tí spurdi Sosialurin Ellind Abrahamsen, um tørvur veruliga var á at fortelja limum felagsins, at teir ikki eiga at vera verkfalsbrótarar**

VERKFALL
*Ingrid Bjarnastein*

– Grundin til, at vit settu lýsingina í útvarpið var, at eg hevði hoyrt, at limir hjá okkum sigldu við ferðafólki, sigur Ellindur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum.

– Hetta er sjálvandi hugstoytt, og eg haldi, at hetta líkist ongum. Tí vórðu vit noyddir at seta lýsingina í. Nú er so bara at vóna, at hon verður fylgd.

Formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum sigur, at um lýsingin ikki verður fylgd, so verður støða tikin til málið aftaná. Hetta kann í ringasta føri hava við sær, at viðkomandi verður koyrdur úr felagnum. Tað er ikki kravt at vera limur í Skipara- og Navigatørfelagnum, men felagið kann nokta limum sínum at arbeiða saman við onkrum, sum ikki er limur.

CAFÉ RÓSAN
á Áarvegnum 14

Café Rósan hevur opið soleiðis til valið:

Flaggdagin 25. apríl kl. 16-19
verður høvi at hitta
Sosialistiskt Ungmannafelag

27., 28. og 29. apríl kl. 16-19.

Valdagin 30. apríl verður opið allan dagin

Caféin bjóðar kaffi, køkur og politiskt tjak

Høvið verður at skifta orð við valevnini

Øll eru hjartaliga vælkomin

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag
&
Sosialistiskt Ungmannafelag

# Sjúkraflutningurin steðgar

VERKFALL
*Ingrid Bjarnastein*

Fyrrapartin mikudagin tá Sosialurin tosaði við Ellind Abrahamsen, formann í Skipara- og Navigatørfelagnum, gjørdi hann greitt, at sjúkraflutningurin um firðir og sund steðgaði á middegi, um Fíggjarmálastýrið ikki játtaði at gjalda fulla løn til teirra, ið taka sær av hesum flutningi.



Ellindur Abrahamsen hevur fleiri ferðir sagt, at teir, ið hava sjúkraflutningin í hendi, eiga at fáa løn fyri fulla tíð, tí teir skulu altíð vera til taks, men Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri sigur, at hetta kemur undir tilkallingarvakt, og tí eiga teir ikki at fáa fulla løn.

Tíverri eydnaðist tað okkum ikki at fáa fatur á Karsteni Hansen til eina viðmerking. Sagt varð av Fíggjarmálastýrinum, at hann var á fundi við Skipara- og Navigatørfelagið á Hotel Føroyum.


Veljið sjálvstýri og vælferð!
Sjálvstýris flokkurin

Shetland Cruise 2002 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
team85

Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag


Gisting á hotelli
úr einans ... 1.149,- fyri hvønn (í lágárstíð)


Gisting á vallaraheimi
úr einans ... 746,- fyri hvønn (í lágárstíð)


Privat gisting
úr einans ... 878,- fyri hvønn (í lágárstíð)

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu

Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.



Ring og hoyr nærri !

e-mail: booking@smyril-line.fo



# Ringast fyri ferðafólkið

**Verri enn so allir bátarnir, sum sigla um Vestmannasund, eru góðkendir at sigla við ferðafólki. Fróði Skúvadal hevur góðkendan bát, sum hann hevur brúkt nógva tíð og pengar uppá at fáa góðkendan, og sigur hann, at tað er upp til ferðafólkini sjálvi at avgera, hvønn bátin tey velja**

VERKFALL
*Ingrid Bjarnastein*


*Barbara er ein av teimum heilt fáu góðkendu bátunum, ið siglir um Vestmannasund*
*Mynd: Edvard Joensen*

– Sjálvandi er tað keðiligt fyri okkum, at bátar, sum ikki eru góðkendir, sigla við ferðafólkið, men eg vil siga, at tað er ringast fyri ferðafólkini sjálvi, sigur 27 ára gamli Fróði Skúvadal, sum í 10 ár hevur siglt undir Vestmannabjørgini.

– Har er ongin trygd fyri tey. Onkrir bátar hava ongi bjargingarbelti, og kanska ein bjargingarbát til fýra fólk, men tá teir sigla við fleiri enn fýra hjálpir tað ikki nógv. Men tað eru fólk sjálvi, sum eiga at vita, at hetta kann gerast vandamikið, og tað er í síðsta enda teirra egna val.

Fróði sigur, at teir bátar, ið eru góðkendir at sigla við ferðafólki, melda hóast alt ikki hinar bátarnar. Teir flestu av bátunum kunnu sigla við 12 fólkum um bjargingarútgerðin er í lagi, men tað er hon ikki hjá fleiri av teimum.

**Bygdur til endamálið**

Sp/f Skúvadal hevur tveir bátar. Annar er Barbara og hin er Urðardrangur. Barbara verður, nú meðan verkfallið er, brúkt til at flyta fólk um sundið.

– Barbara er bygd at sigla við ferðafólki, greiðir Fróði Skúvadal frá. Tað kostaði nógv eyka at fáa trygdarútgerðina upp á pláss. Til dømis er hon bygd í rúmum, sum eru vatntøtt, so um hol kemur inn í tað eina rúmið, so fyllast hini ikki. Eisini er hon gjørd úr serligum glasfibur, sum eldur ikki lætt kemur í. Bara hetta gjørdi, at báturin gjørdist eini 25 % dýrari enn vanligt.

Umframt alt hetta serliga, so skuldi bjargingarútgerð eisini til. Neyðrakettir, eldsløkkjarar, bjargingarbátar/vestar og annað, sum ger tað nóg trygt at sigla við Barbaru.

– Bjargingarbáturin umborð er gjørdur til 37 fólk, og vit hava loyvi at hava 28 umborð. Vit hava eisini eyka bjargingarvestar, so tað skuldi verið í lagi.

– Tað er eitt sindur hugstoytt at síggja, at ein og hvør bátur sleppur at sigla aftur og fram, serliga tí vit hava lagt so nógva orku, tíð og pengar í, at fáa bátin góðkendan.

Fróði vil ikki rættiliga inn á tað neyva talið av peningi, ið brúkt varð fyri at fáa bátin í lagi. Men Barbara er ein P-bátur. Passager-bátur. Tað vil siga, at til hennara, verða somu krøv sett, sum til Norrønu. Maskinpassari skal vera umborð tá siglt verður, og eisini verða heilt onnur krøv sett til, um millum annað stabilitet. Eisini verður kravt, at tann, ið førir bátin, hevur dugnaskapsroynd í sigling.

Síðani hann var 16 ára gamal, hevur Fróði Skúvadal siglt undir Vestmannabjørgini, so hann metir, at hann hevur eitt sindur av royndum, og í summar byrjar hann uppá 11. summarið undir Vestmannabjørgunum.

# Tíðindamenn halda flaggdagsrøðu

*Jústinus Leivsson Eidesgaard fer at flyta fram røðu til Flaggdagshaldið í Funningsfirði*





*Hilmar Jan Hansen verður í Runavík og flytir fram røðu í sambandi við Flaggdagin*

**Í dag er flaggdagur, 25. apríl, og hetta verður hátíðarhildið við flaggdagshaldum kring alt landið**

FLAGGDAGUR
*Ingrid Bjarnastein*

Flaggdagur verður hátíðartíðarhildin mestsum allastaðni í Føroyum í dag. Í ár hava tvey pláss ognað sær ein tíðindamann frá ávíkavist Sosialinum og Útvarpi Føroya at flyta fram flaggdagsrøðuna.

Í Funningsfirði verður flaggdagshald hildið uttanfyri skúlan klokkan 17.00. Har fer Jústinus Leivsson Eidesgaard at flyta fram røðu. Kór í Kollafirði kemur at syngja, og aftaná verður høvi at fáa kaffi og okkurt annað gott í skúlanum.

Runavík hevur hin tíðindamannin. Flaggdagshaldið verður á økinum sunnan fyri Býráðshúsið. Har fer Hilmar Jan Hansen at halda flaggdagsrøðuna, og eisini fer Nes Sóknar Hornorkestur at spæla. Skótar og ítróttarfólk ganga skúgongu frá ítróttarøkinum klokkan 14.30.


Vel vælferð og framburð
Vel Javnaðarflokkin
Kári Petersen
Valevni Javnaðarfloksins
í Suðurstreymi
www.karipetersen.com

Trivnaðarmál

- Nýggjur bústaðarpolitikkur
- Nýggjur barnapolitikkur
- Nýggjur eldrapolitikkur
Elin Lindenskov C
Javnaðarflokkurin
www.lindenskov.com



SEIKO THE GREAT BLUE forhandles hos: 3'arin · SMS, postboks 1057 · FR-100 Torshavn · Tlf.: 35 35 35